VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 02.03.2021 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | |
| Ikki til staðar: | |
| Aðrir partar: | Anna Malena Thomassen, Sølvi Simonarsson |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | | |
| 36/21 | 21/00105-4 | Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| 37/21 | 19/00250-36 | Støðutakan til mótmæli móti broyting í býarplaninum fyri Vága kommunu | 4 |
| 38/21 | 20/00571-3 | Fyrispurningur frá Slættanesfelagnum um ymisk viðurskifti á Slættanesi | 7 |
| 39/21 | 20/01134-10 | Umsókn um byggiloyvi til anneks oman á bilhús á matr.nr. 83ad í Sandavági | 9 |
| 40/21 | 21/00118-2 | Umsókn um byggiloyvi til hjall á matr.nr. 150a í Miðvági | 10 |
| 41/21 | 21/00055-2 | Eigarin av matr. nr. 121b í Miðvági søkir um stuðul til sprossavindeygu. | 11 |
| 42/21 | 21/00032-2 | Eigari av matr.nr. 192i í Sandavági ynskir at keypa afturat stykkinum. | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 43/21 | 21/00125-2 | Umsókn um at keypa part av matr. nr. 231d, í Miðvági | 15 |
| 44/21 | 20/01141-2 | Uppskot um at betra um atkomuøkið, og uppfríska ørindinim ið Mikkjal á Ryggi hevur rist í Hýsisá og at reinsa barkhellur við Hýsisá og at flyta Hondkonusteinin inn í gamla kirkjugarð og seta plátu á. | 16 |
| 45/21 | 21/00079-2 | Støðutakan til uppskot um at stroyma býráðsfundir beinleiðis | 18 |
| 46/21 | 21/00110-2 | Endurskoðan av reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt | 19 |
| 47/21 | 21/00124-2 | Jonhard Selfoss leggur uppskot fyri býráðið um at seta lyktapelar upp á Hornavegnum og Láagøtu í Miðvági | 20 |
| 48/21 | 21/00089-1 | EXTRA21_01<br>Eykaætlan 01 2021 | 21 |
| 49/21 | 21/00078-1 | Val av vatn- og hegnsýnisnevnd fyri Vága kommunu | 22 |
| | | | |

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Til afgørelse**

## 36/21 Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 02.03.2021 | 36/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 02. marts 2021:**

Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 37/21 Støðutakan til mótmæli móti broyting í býarplaninum fyri Vága kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 9/21 |
| 2 Býráðið | 02.03.2021 | 37/21 |

**Málslýsing:**

Í framhaldi av broytingum í býarplaninum í 2016 samtykti býráðið á fundi tann 28.09.2020 at gera fleiri broytingar í býarplaninum fyri Vága kommunu, sum ikki komu við í 2016, eins og lítil broyting var gjørd í byggisamtyktini.
Broytingarnar vóru lýstar alment á vanligan hátt.

**Tá kærufreistin var farin, vóru 4 mótmæli/viðmerkingar komnar til ætlaðu broytingarnar:**

**Mótmæli til punkt 1.** Elspa Egilstoft mótmælti í 2016 at alment frítíðarøki (øki F) gongur gjøgnum fleiri havar á matr. nr. 235a, 234, 83b, 116g, 160b og 74g í Sandavági.

Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til, at økið F og avlagda gøtan norðanfyri parkeringsøkið verður lagt í øki H ( Frílendi). Avlagda gøtan undir parkeringsøkinum verður løgd afturat parkeringsøkinum.
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**Eigararnir av ognunum mótmæla at økið verður broytt til øki H ( Frílendi). Tey ynskja, at økið verður lagt til øki B (sethús).**

**Mótmæli til**

**punkt 4.** Dánjal Poulsen og fleiri heita á kommununa um at víðka sethúsaøki (øki B) í Vatnsoyrum oman móti Torvgøtu. Broytingin fevnir um matr. nr. 397a, 398d, 398e, 400a, 399g, 399l og 402g.
Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til at ganga umbønini á møti.
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**punkt 5.** Katrin Vang mælir til at broyta ásetingar fyri matr. nr. 402e í Vatnsoyrum til sethúsaøki (øki B).
Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til at ganga umbønini á møti.
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**punkt 6**. Majbritt Poulsen mælir til, at almenna frítíðarøki í Vatnsoyrum verður longt yvir á áarbakkan norðanfyri ánna.

Formansváttan:____________

Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til at ganga umbønini á møti.
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**punkt 7.** Karl Johan Nielsen søkir um, at matr. nr. 402d í Vatnsoyrum verður broytt frá at vera øki A (miðstaðarendamál) til øki B (sethúsaøki).

Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til at økið A (miðstaðarendamál) vestanfyri Torvgøtu verður broytt til øki B (sethúsaøki).
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**Ólavur Poulsen mótmælir at ætlaðu broytingarnar undir punktunum 4, 5, 6 og 7 vera framdar.**

**Mótmæli til punkt 8.** Malan Gudmundsen mótmælti í 2016 at matr. nr. 183b í Sandavági er tikið úr sethúsaøki og lagt í øki E (almennir stovnar). Hon biður um, at stykkið verður broytt aftur til øki B (sethús).

Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til, ikki at ganga umbønini á møti.
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**Malan Gudmundsen biður um, at ein ál av matr. nr. 183b fram við Nesavegnum verður broytt til sethúsaøki, sum tað hevur verið fyrr.**

**Viðmerking til punkt 14.** Hjalmar Reynstind hevur biðið um, at ein gongugøta verður gjørd frá Nýggjavegi oman gjøgnum geilina í Heiðaveg.

Tekniska nevnd mælti á fundum tann 07. februar og 11. september 2020 til, at leggja gøtuna í byggisamtyktina.
Býráðið samtykti á fundum tann 24/02 og 28/09-2020 at taka undir við teknisku nevnd.

**Jákup í Løðu viðmerkir, at rottangi hansara liggur júst har, ætlanin er at binda gøtuna í Heiðaveg og mælir til, at gøtan verður løgd niðanfyri hann.**

**<u>Tekniska nevnd 12. februar 2021:</u>**
**Avgerð:**

Formansváttan:________________

Mælt verður til at ganga mótmælinum viðv. pkt. 7 á møti, og annars halda fast við allar aðrar broytingar.

**<u>Býráðið 02. marts 2021:</u>**

**Pkt. 1**: samtykt at taka undir við teknisku nevnd. Herborg Gaardlykke, Rósa Samuelsen og Jónhard Selfoss atkvøddu ímóti.
**Pkt. 4-7:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd. Rósa Samuelsen og Jónhard Selfoss atkvøddu ímóti at ganga mótmælinum viðv. pkt. 7 á møti..
**Pkt. 8:** Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd
**Pkt. 14:** Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

## 38/21 Fyrispurningur frá Slættanesfelagnum um ymisk viðurskifti á Slættanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 18.01.2021 | 3/21 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.02.2021 | 15/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 10/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 13/21 |
| 5 Býráðið | 02.03.2021 | 38/21 |

**Málslýsing:**

Felagið ger vart við, at eitt alment wc manglar á Slættanesi. Harafturat føra tey fram ynski um, at fáa ein hjartastartara í bygdina. Avbjóðingin er tó, at eingin streymur er í bygdini og tí er neyðugt við alternativari elorku.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 18. januar 2021:**
**Avgerð:**
Avgjørt at bjóða Slættanesfelagnum á fund við mentunar- og trivnaðarnevndina.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. februar 2021:**
**Avgerð:**
Mælt verður til at nevndin fær heimild frá býráðnum at samráðast við hagan og Slættanesfelagið um ein samstarvssáttmála um skúlan.
Mælt verður til at gera ábøtur á húsið og gera eitt wc í skúlanum, og at fáa ein fyrstuhjálparkassa út í skúlan. Spurningurin hevur verið vendur við Slættanesfelagið, í hvønn mun tey kunnu verða við í arbeiðinum. Tey venda aftur.

Formansváttan:__________

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at mentunar- og trivnaðarnevndin fær heimild frá býráðnum at samráðast við hagan og Slættanesfelagið um ein samstarvssáttmála um skúlan.

Jóanis Albert Nielsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Taka undir við Teknisku nevnd.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Jóanis Albert Nielsen luttók ikki í viðgerini av málinum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 39/21 Umsókn um byggiloyvi til anneks oman á bilhús á matr.nr. 83ad í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 11/21 |
| 2 Býráðið | 02.03.2021 | 39/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 83ad í Sandavági søkir um byggiloyvi til bilhús við anneks.

Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt umsóknina, og lýkur hon øll krøv uttan frástøðu til grannamark.

Eigarin hevur hoyrt grannan, og sigur hann seg onki hava ímóti at bygt verður nærri grannamarki enn 2,5 m.

Viðmælt verður at geva byggiloyvi. Treyta av at útveggurin móti grannamarki verður gjørdur, sum eldverjuveggur.

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt verður at geva byggiloyvi. Treyta av at útveggurin móti grannamarki verður gjørdur, sum eldverjuveggur.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 40/21 Umsókn um byggiloyvi til hjall á matr.nr. 150a í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 15/21 |
| 2 Býráðið | 02.03.2021 | 40/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr. 150a í Miðvági søkir um loyvi at byggja ein hjall sambært viðheftu tekning.

Viðmerking:
Umsitingin hevur viðgjørt málið. Hjallurin er nærri markinum enn 2,5m, men tað er bilhúsið eisini. Mett verður ikki at hjallurin minkar um útsýni fyri ferðslu ella annað..
Umsitingin mælir til at geva loyvi.

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 41/21 Eigarin av matr. nr. 121b í Miðvági søkir um stuðul til sprossavindeygu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 14/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 17/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 41/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av mat. Nr. 121b íMiðvági søkir um stuðul til sprossavindeygu, vísandi til grein 11 í serstøku byggisamtyktini fyri býlingin á Ryggi.

Umsøkjarin hevur viðlagt tilboð frá tveimum veitarum.

Annað tilboðið er frá Grant, og er tað uppá vanlig plastvindeygu.
Tilboðið er uppá kr. 60.812,50 íroknað mvg.

Hitt tilboðið er frá Snikkaravirkinum D.P.H og er tað uppá sprossavindeygu úr sipo-mahogny
Tilboðið er uppá kr. 139.500,- íroknað mvg.

Upphæin søkt verður um stuðul til er munurin millum tilboðini, sum er **kr. 78.687,00** íroknað mvg.

Grein 11 er soljóðandi:

*Grein 11. Vegleiðing og stuðul.*
*Kommunan veitir ráð og vegleiðing í sambandi við bygging og umvæling av ognum innan samtyktarøkið.*

*Í sambandi við umvælingar av húsum uttan kann kommunan eftir umsókn rinda kostnaðarmunin millum tað, sum ætlanin er at gera, og tað, sum ynskiligt er út frá einum varðveitingarsjónarmiði.*

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Húsini stuðul verður søktur til eru so nógv broytt longu nú, og kommunan hevur givið loyvi til at tey verða broytt einaferð enn, so tey líkjast als ikki teimum upprunaligu húsunum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Frámælt at stuðla.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Meirilutin mælir til at veita stuðul upp til kr. 20.000,- + mvg.
Eftir upplýsing frá DPR, er prísmunurin á sprossavindeygum og vanligum vindeygum uml. kr. 20.000,- + mvg.
Herborg Gaardlykke luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Herborg Gaardlykke luttók ikki í viðgerini av málinum.

Formansváttan:____________

## 42/21 Eigari av matr.nr. 192i í Sandavági ynskir at keypa afturat stykkinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 13/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 16/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 42/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr. 192i, á Merkrunum 5 í Sandavági, ynskir at keypa restina av innkoyringini til matrikkulin, so hann eigur alla innkoyringina til húsini.
Tað petti, ið restar í av innkoyringini er kommunalur vegur. Sí kort niðanfyri.



Kommunan selur vanliga ikki av almennum vegi.

Viðmerking:
Umsitingin mælir staðiliga frá at selja.
Um selt verður, kemur matr.nr 192d at liggja í miðjuni av fleiri privatum stykkjum, uttan møguleika fyri beinleiðis atkomu til matrikulin.

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Frámælt at selja.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:______________

## 43/21 Umsókn um at keypa part av matr. nr. 231d, í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.02.2021 | 4/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 12/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 43/21 |

**Málslýsing:**

Sp/F Fastogn í Miðvági søkir um at keypa uml. 225 m$^2$ av matr. Nr. 231d, í Miðvági. Økið talan er um er sunnanfyri og eystanfyri matr. Nr. 150b, í Miðvági, sum Sp/F Fastogn eigur, sí viðløgdu skjøl. Í løtuni leigar felagið part av hesum økinum, og hevur bygning standandi á leigugrundini.

**Vinnu- og havnanevndin 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Frámælt at selja.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Meirilutin tekur undir við Vinnu- og havnanevndini.
Albert Ellefsen tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Samtykt at beina málið aftur í Vinnu- og havnanevndina.

Formansváttan:__________

**44/21 Uppskot um at betra um atkomuøkið, og uppfríska ørindinim ið Mikkjal á Ryggi hevur rist í Hýsisá og at reinsa barkhellur við Hýsisá og at flyta Hondkonusteinin inn í gamla kirkjugarð og seta plátu á.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 18.01.2021 | 7/21 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.02.2021 | 16/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 12/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 15/21 |
| 5 Býráðið | 02.03.2021 | 44/21 |

**Málslýsing:**

Albert Ellefsen hevði fund við Hannu, Annu og Jóhannus Hansen, og settu tey fram trý ynski:

1. Betra um atkomuøkið og uppfríska ørindini, ið Mikkjal á Ryggi hevur rist í Hýsisá.
2. Reinsa Barkhellurnar við Hýsisá og seta skelti upp við kunning.
3. Flyta Hondkonusteinin inn í gamla kirkjugarð og seta plátu á við søgu um steinin.

**Nýggir upplýsingar 02.03.2021:**
Umsøkjararnir hava tikið umsóknina viðv. pkt. 3 aftur.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 18. januar 2021:**
**Avgerð:**

Avgjørt at bjóða stigtakarunum inn til næsta fund, og taka málið uppaftur tá.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. februar 2021:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at uppfríska ørindi hjá Mikkjal á Ryggi í Hýsisá og kannað møguleikan hvat kann gerast við barkhellurnar. Og mælt verður til at flyta hondkonusteinin inn í gamla kirkjugarð og seta plátu á við søgu um steinin.

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Tikið verðu undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Taka undir við tilmælinum hjá Mentunar- og Trivnaðarnevndini og Teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**<u>Býráðið 02. marts 2021:</u>**

Samtykt at geva mentunar- og trivnaðarnevndini heimild at kannað pkt. 1 og 2 nærri.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 45/21 Støðutakan til uppskot um at stroyma býráðsfundir beinleiðis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.02.2021 | 11/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 20/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 45/21 |

**Málslýsing:**

Herborg H. Gaardlykke býráðslimur hevur lagt uppskot fram um, at stroyma býráðsfundir beinleiðis.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Fyri at kunna stroyma býráðsfundir beinleiðis, krevst samtykki frá øllum býráðslimum. Verður uppskotið samtykt mugu íløgur eisini gerast í stroymingarútgerð.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. februar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Mælt verður til at stroyma býráðsfundir.
Um býráðið tekur undir við tilmælinum verður mælt til at keypa stroymingarútgerð frá NEMA. Kostnaðurin er kr. 105.000,- + mvg. Útreiðslan skal fíggjast við eykajáttan.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Samtykt ikki at taka undir við uppskotinum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 46/21 Endurskoðan av reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 08.02.2021 | 12/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 18/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 46/21 |

**Málslýsing:**

Endurskoðan av reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 08. februar 2021:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at gera fylgjandi broytingar:

- Seta inn sum nýggja § 1: «Stuðul sambært hesi reglugerð verður latin tvær ferðir árliga. Umsóknir skulu verða kommununi í hendi skrivliga innan 1. mars og 1. september»
- Til § 7 skal fylgjandi tekstur leggjast afturat: «harafturat skal ein kostnaðarmeting fyriliggja»

Strika § 8, stk. 5.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Taka undir við tilmælinum hjá Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:__________

## 47/21 Jonhard Selfoss leggur uppskot fyri býráðið um at seta lyktapelar upp á Hornavegnum og Láagøtu í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2021 | 16/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 19/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 47/21 |

**Málslýsing:**

Jonhard Selfoss leggur uppskot fyri býráðið um at seta lyktapelar upp á Hornavegnum og Láagøtu í Miðvági.
Talan er um teinin frá Hornaveg 27 út til Ríðingarhøllina, og teinin frá Hornaveg niðan til Láagøtu 1.

Talan er um umleið 12 lyktapelar til allan teinin.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Metingin hjá umsitingini er at pelarnir kosta umleið kr. 8.000,- fyri hvønn. So samlaði kostnaðurin fyri 12 lyktapelar verður umleið kr. 96.000,-

Grevstur og uppseting kann tekniska toymi standa fyri, so hetta kann fíggjast yvir raksturin.

**Tekniska nevnd 12. februar 2021:**
**Avgerð:**

Nevndin mælir frá at seta lyktapelar upp.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd

**Býráðið 02. marts 2021:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd. Jónhard Selfoss atkvøddi ímóti.

Formansváttan:________

VÁGA KOMMUNA

# 48/21 EXTRA21_01
# Eykaætlan 01 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 10/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2021 | 11/21 |
| 3 Býráðið | 02.03.2021 | 48/21 |

**Málslýsing:**

**1. viðgerð av eykaætlan EXTRA21_01**

Eykaætlanin umfatar flyting av óbrúktari játtan í 2020 til nýggja játtan í 2021

| | | | |
|---|---|---|---|
| § 3. | Børn og ung | kr. | 16.000,- |
| § 4. | Undirvísing | kr. | 250.000,- |
| § 6. | Teknisk mál rakstur | kr. | 1.650.000,- |
| § 6. | Teknisk mál løga | kr. | 3.712.000,- |
| § 7. | Kommunal virki | kr. | 900.000,- |
| § 7. | Kommunal virki løga | kr. | 500.000,- |

**Fíggjarnevndin 28. januar 2021:**
**Avgerð:**
Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2021:**
**Avgerð:**
Viðmælt.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:__________

# 49/21 Val av vatn- og hegnsýnisnevnd fyri Vága kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 02.02.2021 | 35/21 |
| 2 Býráðið | 02.03.2021 | 49/21 |

**Málslýsing:**

Val av limum í vatn- og hegnsýnisnevndina.

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at útseta málið til næsta býráðsfund.

**Býráðið 02. marts 2021:**

Einmælt samtykt at velja: Jóhannus Hansen, Sandavágur, Heri Christoffersen, Sandavágur, Arngrím Thomassen, Sandavágur, Gerhard H. Hansen, Miðvágur, Høgni Joensen, Miðvágur, Jonhard Magnussen, Miðvágur og Pól Skarðenni, Vatnsoyrar.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 21.00

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:____________